# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroya best goymdi loynidómur

Hvussu nógv hevur Búskaparskipan Landsins kostað at ment, og hvussu nógv kostar hon í rakstri?

Hetta er ein einfaldur spurningur, og ein skuldi trúð, at eitt einfalt svar kann gevast úr Albert Hall. Vit hava fyrr sett sama spurning á hesum stað, og tá komu bert vissanir úr Fíggjarmálaráðnum um, at arbeiðið hevði verið boðið út.

Tað er sjálvsagt mikið gott, men tað svarar ikki spurninginum. Og vit seta hann tí enn einaferð.

Tað er umráðandi, at hetta ikki er ein loynidómur, fyri at Føroya fólk og politikarar kunnu síggja, hvat centraliseringin seinastu árini av almennu Føroyum hevur kostað, nú hvør vegastubbakróna verður vend og snarað. Kanska tað kundi skundað undir eitt tiltrongt kjak um, hvussu almennu Føroyar skulu leiðast og ikki stýrast. At leiða er lyklaorðið. Stýring er eitt gamaldags hugtak, sum er sprottið úr einum hugburði, har millum lítið og einki álit er á starvsfólkini.

Almennn starvsfólk úti á stovnum og ráðum eru betri kvalifiserað í dag enn nakrantíð fyrr. Eisini eru stýringsamboðini, sum eru til taks hjá stovnum og ráðum, betri enn nakrantíð fyrr. Hóast hetta, so hava vit í Føroyum centraliserað meir enn nakrantíð fyrr, og stovnsleiðarar hava ongantíð havt so avmarkaðar heimildir sum nú. Hetta hongur ikki saman.

Okkara játtanarskipan elvir til stirvni og initiativloysi. Hon er eitt úrslit av, at man eftir seinastu kreppu fór úr veitini einu megin vegin við ov linum mannagongdum fullkomuliga í veitina hinumegin vegin við alt ov stirvnum mannagongdum.

Tað er eyðsæð, at ein almenn skipan, har hvør almenn bógskrúva skal á tingborð og har hvør lítil vegastubbi skal í eina verklagslóg, er alt ov stirvin og dýr. Vit mugu fáa fleiri rammujáttanir, so at tingið fær tíð at fáast við ordiligan politikk, heldur enn at skula lesa í smálutum, hvat skal gerast við Smyril í dokk í einari eykajáttanarlóg.

Hvussu nógv man fíggjarlógararbeiðið ikki kosta í óneyðugari tíðarnýtslu í Aðalráðum til óneyðugar smálutir hvørt ár? Hvussu nógv man tað ikki kosta at fyrireika smáar verklagslógir og lógaruppskot, sum eru alt ov langt niðri í skipanini í detaljum?

Fyri einari tíð síðani var ein norskur serførðingur í rakstri, sum starvast í Statoil og eitur Bjarte Bogsnes, í Føroyum og helt fyrilestur fyri vinnulívinum, um hvussu øvugt og ineffektivt tað var, tá man centraliseraði og toppstýrdi meir og meir í takt við, at starvsfólk blívu betri og betri fyri fakliga og initiativmessiga.

Vónandi lurtar man í Føroya Landsstýri eftir slíkum tonkum. Tað er umráðandi í hesum tíðum, at vit fáa gjørt almennu Føroyar effektivari og bíligari at reka m.a. við at decentralisera ábyrgd til vælútbúnu starvsfólkini úti á stovnum, so at initiativ í borgaratænastunum aftur kemur í hásæti. Tað almenna skal leiðast úr aðalráðum, ikki stýrast.

**Sosialurin**

## Nýggjur skúlapolitikkur skal hækka vitanarstøðið

HELENA DAM Á NEYSTABØ
landsstýriskvinna



**Vitanarstøðið skal hækka**
Vitanarstøðið skal hækka í fólkaskúlanum og í útbúgvingarskipanini yvirhøvur. Tað er fremsta málið í teimum útbúgvingarpolitisku átøkum, sum eg sum landsstýriskvinna í mentamálum fari at leggja fram.

Tíðin er av álvara komin at umhugsa ein nýggjan og betri skúla fyri okkara ungu. Vitan, útbúgving og fjølbroytni er einasti vegur fram. Velja vit ikki vitan, og vilja vit ikki broytingar, so verða Føroyar meira og meira afturúrsigldar.

**Eftirmetingarskipanirnar vísa, at støðið er ov lágt**
Nógv gott er gjørt seinnu árini fyri fólkaskúlan. Tað eru eisini bygdir góðir skúlar ymsa staðni í landinum – men enn er stórur munur á hølisumstøðum.

Fleiri eftirmetingarskipanir eru settar í verk, og fleiri undirvísingartímar eru lutaðir út til skúlan fyri at hækka støðið og at geva næmingunum eina so góða undirvísing, sum møguligt. Góð átøk og framstig, sum eru sett í verk til tess at bøta um tey brek, sum eftirmetingarnar (bæði Pisaroyndir og landsroyndir) so púra greitt og týðiligt hava víst. Men vit hava enn ikki gjørt eina samsvarandi íløgu í læraran, sum eisini má fáa møguleika fyri og fáa álagt at eftirútbúgva seg.

**Tvílæraraskipanin og sernámsfrøðin**
Tá ið skúlaárið 2009-2010 byrjar, verður farið undir eina nýggja tvílæraraskipan í fyrsta og øðrum flokki. Hetta verður gjørt fyri at betra um møguleikan at geva hvørjum einstøkum næmingin júst ta avbjóðing, sum hon ella hann hevur brúk fyri.

Tá ið næmingatalið í fyrsta flokki ella øðrum flokki fer upp um 17, verða fleiri tímar lutaðir til flokkin, og tá ið 24 næmingar eru í flokkinum, ber til at hava tvílæraraskipan 14 av 24 tímum um vikuna í hesum flokki. Tað er veruliga eitt stórt framstig. Samstundis fáa skúlarnir fleiri tímar til miðfirraða serundirvísing til næmingar, ið krevja serlig undirvísingartilboð í styttri ella longri tíðarskeið.

Tað sum nú stendur fyri framman, er at útbúgva lærarar, so at full nytta fæst burtur úr øktu ressursunum.

**Skúlabygnaðurin má broytast**
Men vit hava ikki gjørt nakað við skúlabygnaðin. Í áratíggju hava vit rikið fólkaskúlan eftir einum leisti, sum varð lagdur, tá ið neyðugt var at fara um dalar og fjøll, tá ið ferðast skuldi millum bygda.

Vit vita øll, at tað er ikki longur neyðugt. Føroyar hava seinni árini gjørt íløgur fyri 1.000 tals milliónir í samferðslu, vegir, tunnlar og brýr. Ein niðurstøða frá PISA-kanningini er, at við so nógvum smáum skúlum, er trupult at hava fakligan lærarafórleika í øllum lærugreinum.

Tí er stundin komin at broyta skúlabygnaðin grundleggjandi, so at hann verður lagdur til rættis við tí endamáli, at geva næminginum tað besta og mest fjøltáttaða skúlatilboðið sum møguligt, og við tí endamáli at hækka vitanarstøðið munandi.

Skúlin skal menna bæði fakligar førleikar, sosialar førleikar og ikki minst kreativar og skapandi førleikar. Somuleiðis skal skúlin rúma øllum børnum, pláss skal vera fyri fjølbroytni og ymiskleika. Ja, ymiskleikin skal vera ein styrki og ikki ein trupulleiki.

Ein av stóru forðingunum fyri, at hetta kann eydnast, eru tær ov nógvu og ov smáu fólkaskúlaeindirnar.

**Føroyar skulu skipast í 7 – 10 skúlaeindir beinan vegin**
Fyri at fáa ein betri fólkaskúla, mugu og skulu vit skipa Føroyar í færri og størri skúlaeindir sum skjótast. Eg fari at mæla til, at Føroyar verða skipaðar í 7 til 10 skúlaeindir, og at gera neyðugar lógarbroytingar og aðrar fyrisitingarligar broytingar beinan vegin.

Somu møguleikar til øll krevur fjølbroytt tilboð

Eindarskúlin er ein góð og samhaldsføst skipan, sum vit skulu halda rimmar fast um. Ein og hvør skal fáa eitt skúlatilboð, sum mennir hin einstaka, og elur fram tey evni og teir førleikar, sum búgva í øllum menniskjum.

Skal hetta endamál eydnast, mugu vit ásanna, at sama møguleika gevur tú ikki børnum og ungum, við at geva teimum akkurát sama tilboð, akkurát somu undirvísing, somu bøkur og somu avbjóðingar. Møguleiki skal vera fyri at veita eitt nógv meiri fjølbroytt tilboð til hvønn einstakan.

Pláss skal vera fyri at differentiera undirvísingina, at geva tí sterka eitt serstakt tilboð, eins væl og tí veika. At geva tí kreativa eitt kreativt tilboð og tí musikalska eina musikalska avbjóðing, tí handaligt begávaða og tí bókliga begávaða skal standa ein avbjóðing í boði, sum fær tað besta í næmingnum fram. Men alt hetta ber ikki til í so smáum eindum, sum vit hava í Føroyum. Tilfeingi má nýtast betur. Og so ikki at gloyma - skal alt hetta eydnast, skal ein miðvís íløga gerast í at útbúgva og eftirútbúgva lærararnar og leiðslurnar í skúlunum.

**Samfelagsmenningin byrjar í fólkaskúlanum**
Samfelagið hevur brúk fyri kreativiteti, fyri mentanarligari nýhugsan, fyri íverksetaranda og fyri einum hægri vitanarstøði.

Eg haldi, at tað sigur seg sjálvt, at við so nógvum smáum skúlaeindum, hava vit ongan kjans at menna okkara skúlaskipan. Og tað er ein vanlukka, tá ið vit vita, hvussu umráðandi tað er fyri samfelagsmenningina.

Tí skulu vit so skjótt sum møguligt fara undir at samskipa skúlan til í mesta lagi 10 eindir – helst bara sjey. Tað ber ikki longur til at siga, at nú bíða vit eftir hesum ella hasum, kommunusamanlegging ella útjavningarskipan.

Tað hava vit gjørt í alt, alt ov mong ár.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.